BILATORGIÐ

Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag

NISSAN PRIMERA 2,0 SE
Árg 1998, Km 105.000. Bilurin hevur Alu-felgur og leðursetur..
Kr. 118.000.

PEUGEOT 306 DIESEL
Árg 1996, Km 155.000. Kr. 75.000.

PEUGEOT 306 DIESEL
Árg 1995, Km 205.000. Kr. 65.000.

PEUGEOT 406 2,1TD
Árg 1998, Km 153.000. Kr. 127.000.

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Árg 1995, Km 152.000. Kr. 65.000.

FORD ESCORT MONACO 1,8I
Árg 1998, Km 123.000. Kr. 85.000.

FORD ESCORT ST.CAR 1,6
Árg 1996, Km 110.000. Kr. 65.000.

FORD MONDEO ST.CAR 1,8TD
Árg 1995, Km 135.000. Kr. 95.000.

MITSUBISHI GALANT 1,8
Árg 1991, Km 161.000. Kr. 43.000.

NISSAN ALMERA 1,6
Árg 2000, Kr. 115.000.

NISSAN ALMERA COMFORT 2,2DI
Árg 2000, Km 63.000. Alufelgur við summardekkum fylgja við..
Kr. 145.000.

NISSAN MICRA 1,3 SRI
Árg 1998, Km 41.000. Kr. 89.000.

OPEL ASTRA 1,7DT VAN
Árg 1997, Km 82.000. *Prísur fyrr Kr. 78.000* – **Nú** Kr. 65.000.

OPEL ASTRA 1,7D
Árg 1996, Km 159.000. Kr. 52.000.

OPEL ASTRA 1,7DT
Árg 1996, Km 156.000. Kr. 75.000.

OPEL ASTRA 1,7TD ST.CAR
Árg 1999, Kr. 115.000.

OPEL ASTRA 1,6 GLX
Árg 2001, Km 30.000. Kr. 119.000.

OPEL CORSA SPORT 1,4
Árg 1995, Km 70.000. Kr. 50.000.

OPEL VECTRA 1,6 GLI
Árg 1994, Km 122.000. Kr. 59.000.

OPEL VECTRA 2,0 DTI ST.CAR
Árg 1997, Kr. 125.000.

PEUGEOT 106 1,4
Árg 1997, Km 80.000. Kr. 69.000.

PEUGEOT 306 1,9D
Árg 1999, Km 61.000. Kr. 125.000.

PEUGEOT 306 1,9DTGRØNUR
Árg 1996, Km 162.000. Kr. 75.000.

PEUGEOT 406 ST 2,0 HDI
Árg 1999, Km 120.000. Kr. 155.000.

PEUGEOT 406 TS6
Árg 2001, Km 57.000. V6 210HK.
Kr. 210.000.

PEUGEOT 607 HDI 2,2
Árg 2001, Km 120.000. Tip-Tronic.
Prísur fyrr Kr. 275.000 –
Nú Kr. 259.000.

TOYOTA AVENSIS SOL 2,0DTI
Árg 1998, Km 185.000. Kr. 130.000.

PEUGEOT NISSAN P/F Meinhardt Arge
Tel 345400 nissan@nissan.fo heimasíða: www.nissan.fo

VOLVO S40 1.8
Árg mars 01, Km 46.000. Sum nýggjur. Kr. 199.000.
Uttan býtisbil / 189.000,- Kr.

OPEL VECTRA 1.8
Árg Jan-99, Km 30.000. Sera væl hildin . Kr. 128.000.
Fyri kunda = uttan býtisbil

HONDA ACCORD 1.8 I
Árg apr.98, Km 84.000. Í góðum standi. Kr. 124.000.
Sýnaður 06.06.02 - Uttan býtisbil * 112.000,- Kr.

OPEL ASTRA 2.0 TDI
Árg jan. 99, Km 70.000. Sýnaður 13.12.02. Kr. 119.000.
Uttan býtisbil * 109.000,- Kr.

TOYOTA COROLLA 1.3 L/B
Árg jan. 01, Km 20.000. Sera væl hildin . Kr. 119.000.
Uttan býtisbil 109.000, Kr.

RENAULT LAGUNA 1.8 H/B
Árg okt. 01, Km 29.000. "partvís leður inntrekk, 17"" alu-felgur, CD-boks, spoylari o.m.m.a.".
Kr. 199.000.
Uttan býtisbil 189.000, Kr.

RENAULT LAGUNA 1.6 H/B
Árg mei 01, Km 22.000.
Kr. 179.000.
Uttanbýtisbil 169.000,- Kr.

SUZUKI BALENO
Árg nov. 97, Kr. 69.000.
Uttan býtisbil 59.000,- Kr.

VOLVO RENAULT VR BILAR Hoyviksvegur tel 322110

LÝSIÐ
við
brúktum
bilum
í Sosialinum

Fyrivarni verður tikið fyri villum

PEUGEOT 406 2.1 HDI DIESEL 7.PERS. STATIONCAR
Árg Nov.97, Km 111.000.
Vælhildin: Fj. Stýrt centrallás C.D. Anlegg -Alufelgur-Hiti í forsetrum-El.Rútar v.m. 7.persónar..
Kr. 140.000.

ROVER 25 CLUB
Árg 20.sep 2001, Km 14.650.
Vælhildin : Fj. Stýrt centrallás C.D.Anlegg-El. rútar-El.spegl-lufelgur eyka hjólsett við v.m.
Kr. 135.000.

OPEL VECTRA 1.8I GL
Árg Maj.-95, Km 81.700.
Vælhildin:Centrallás- El. Spegl - C.D.Anlegg . v.m. Kr. 65.000.

MAZDA 323 F
Árg 1993, Km 182.000. Kr. 36.000.

TOYOTA COROLLA 1.6
Árg Dec-91, Kr. 30.000.

FIAT BRAVO 1.6 SX
Árg 96, Km 97.000. Vælhildin: Centrallás- El. Rútar- Radio v.bandspælara - Alufelgur .
Kr. 50.000.

P/f D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650

MPV TIL SØLU
Nissan Prairie árg 94 TÝSKUR bilur, svartur, bakhurðar langsgangand, sportfelgur sóltak
2 sett dekk, sóltak, el rútar og sentrallás.
SKAL SÍGGJAST EINANS
Kr. 110.000 KR V.MVG
TLF. 224910

CITROEN ZX 1.9TD
Árg MAI'1997, Km 160.000.
Kr. 85.000.

SKODA OCTAVIA 1.6I GTX
Árg NOV'1999, Km 45.000.
Kr. 120.000.

VW POLO 1.3I
Árg MAI'1992, Km 58.000.
Kr. 35.000.

CITROEN XANTIA 1.9TD
Árg MAI'1998, Km 51.500.
Kr. 130.000.

CITROEN XSARA 1.6I SX
Árg APRÍL'2002, Km 12.500.
Kr. 150.000.

MITSUBISHI GALANT 1.8I
Árg JUNI'1989, Km 158.000.
Kr. 35.000.

OPEL VECTRA 2.2DTI
Árg OKT'2000, Km 75.000.
Kr. 170.000.

TOYOTA HI-ACE 2.4D-TURBO AUT.
Árg MAI'1999, Km 104.000.
Kr. 150.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

Varðveitingararbeiðið í Koltri

Frágreiðing frá Føroya Forngripafelag

Tað hevur verið nógv skrivað, og fleiri samrøður hava verið í útvarpi og sjónvarpi um oman fyri nevnda evni, men felags fyri hesa skriving og sendingar er, at Føroya Forngripafelag sjáldan verður nevnt, og um so er, so er tað ytst úti á síðulinjuni.

Leygardagin 15. mars 2003 hevur Poul á Kletti í Dimmalætting nr. 52 langa viðtalu við Gunnar Hoydal, hvar nógv gott og rætt verður sagt um tann dýrgripin, gamla byggingin í Koltri er, bæði so og so. Yvirskriftin: »Koltur eigur ikki sín líka«, hoskar væl.

Aftur her kann man siga at Forngripafelagið verður nógv tilsíðissett, tá sagt verður, »Føroya Forngripafelag hevur eisini verið uppi í arbeiðinum«.

Nú halda vit tað vera rætt at koma við einari rættleiðing, tí Føroya Forngripafelag hevur ikki bara »verið uppi í arbeiðinum«, men byrjaði bjargingararbeiðið við at skjóta upp at seta eina nevnd til at gera eina serskipan fyri Koltur, soleiðis at Koltur kundi koma undir bygdasavnslógina. Serskipanin kom í lag, og landsstýrið álegði Føroya Jarðarráði at síggja til, at øll fornminnini í Koltri vórðu varðveitt, men sum so ofta, so hendi ikki meira.

Eftir ódnirnar frá 1988 til 1992 stóð sera illa til í Koltri, nógv var rivið, og uppaftur meira stóð at leypa. Hetta helt Forngripafelagið sjálvsagt vera stórt spell, tí vit kendu virðini av allari tí gomlu byggingini í Koltri. Vit royndu tí at ávirka okkara avvarðandi myndugleikar, og serliga Føroya Jarðarráð, at hjálpa til, men vit vintu tað munnliga svarið frá stjóranum, at teir vildu ikki geva okkum loyvi til at fara undir nakað bjargingararbeiði í Koltri, men teir vildu heldur ikki nokta fyri tí. Hetta var løgið svar, men týðuligt var, at Jarðarráðið kendi sær onga ábyrgd av fornminnunum í Koltri.

Forngripafelagið gjørdi so av sjálvt at byrja bjargingararbeiðið í Koltri. Vit fingu tríggjar avbera góðar menn til arbeiðis, og alt byrjaði í góðum samstarvi við táverandi festaran, sum eisini hjálpti til, tá hann hevði stundir til tess. Eisini arbeiddu einkultir limir felagsins fyri einki í frítíð teirra.

Alt arbeiðið varð sjálvsagt gjørt í tøttum samstarvi við Føroya Fornminnissavn, sum eisini var við til at fáa samband við arkitektaskúlan í Keypmannahavn. Tað væla arbeiðið, sum Palle Dyreborg og Poul Jensen saman við næmingum teirra gjørdu, var av avgerandi týdningi fyri úrslitið, vit nú síggja har. Eisini er øll tann gamla byggingin væl og virðiliga staðfest á tekningum teirra.

Tá komið var út í 1995, var so mikið á leið komið, at alt, sum ikki heilt var avfallið, var bjargað. Nógv hús vóru liðug uttan og onnur væl avstívað og soleiðis bjargað til seinni at verða gjørd liðug. Tá so langt var komið, høvdu vit nýtt kr. 785.000,-. Frá Sonningsfondinum fingu vit kr. 250.000,-, frá Føroya Sparikassa kr. 175.000,-, og frá Drotningagrunninum kr. 20.000,- í studningi. Restina kr. 340.000,- hevur Forngripafelagið sjálvt goldið.

Sum tað sæst, so gjørdi Forngripafelagið **alt** varðveitingararbeiðið uttan tað, arkitektarnir gjørdu.

Nú var ikki hildið ráðiligt at halda fram, fyrr enn tey formligu viðurskiftini vóru komin í rættlag, so sum friðing og skipan av einum felagsskapi í tráð við bygdasavnslógina til at standa aftan fyri arbeiðið. Hetta arbeiðið varð gjørt í samráð við Hest Kommunu og Bjørn Patursson, nýggja festaran í Koltri. Sakførari hjálpti okkum við at skriva reglurnar, soleiðis at tær svaraðu til krøvini í bygdasavnslógini. Hest kommuna og Forngripafelagið góðkendu reglurnar beinan vegin, men frá Jarðarráðnum kom einki svar, og tí kom hetta ikki í lag.

Á ferð í Føroyum vórðu umboð fyri Ny Carlsbertfonden kunnað um tey stóru mentanarvirðini, sum Forngripafelagið hevði bjargað í Koltri, og vóru teir sera hugtiknir av hesum. Teir buðu sær til at veita stórfingnan studning til framhald av hesum arbeiðinum, men sjálvsagt fylgdu treytir við hesum. Nú raknaði Føroya Jarðarráð við, men tað vísti seg skjótt, at tað bert var fyri at fáa hendur á hesum nógva danska peninginum og sjálvir avgera, hvussu hann skuldi nýtast.

Í sambandi við hetta stórtøkna tilboðið frá Ny Carlsbergfonden valdi landsstýrið eina nevnd at gera enn eina reglugerð fyri Koltur, og eitt ávíst fundarvirksemi tók seg upp fyri at fáa øll hesi viðurskiftini í rættlag. Tá hetta arbeiðið var um at vera liðugt, hendi tað sera løgna, at á einum fundi í Mentamálastýrinum 8. mars 2000 boðaði formaðurin í Føroya Jarðarráði frá, at Føroya Forngripafelag skuldi útihýsast úr øllum arbeiðinum, sum hevði við eitt komandi Kolturssavn at gera og sostatt missa alt samband við framtíðar varðveitingararbeiði í Koltri.

Hesum skiltu vit sum vera man einki av, og teir, sum allar minst skiltu nakað av hesum, vóru umboðini fyri Ny Carlsbergfonden. At Føroya Forngripafelag, sum hevði bjargað nevndu gripum og skaffað so nógvan pening til varðveitingararbeiðið í Koltri, nú knappliga skuldi koyrast út úr øllum arbeiðinum, ið felagið við so góðum úrsliti hevði lagt alla sína orku í. Vit hava seinni fingið at vita, at hendan hendingin mundi vera ein av høvuðsorsøkunum til, at Ny Carlsbergfonden tók sína tilsøgn aftur, tí teir høvdu stóra virðing fyri tí varðveitingararbeiðinum, Forngripafelagið hevði gjørt í Koltri.

Nú síggja vit, at Jarðarráðið hevur stovnað Kolturs-grunn og valt nevnd í hann, uttan á nakran hátt at lata Føroya Forngripafelag, ið hevur goldið alt sum gjørt er, vitað av hesum. Enn er einki likið út um, á hvønn hátt hesin grunnur er skipaður, og hvussu tann veruligi arbeiðssetningurin er, men eftir samansetingini av nevndini at døma verða tað neyvan fornminnini, ið fáa hægstu viðurkenning, so sum Gunnar letur tað ljóða í viðtaluni. Nevnast skal eisini her, at fleiri av húsunum, sum Forngripafelagið setti í stand fyri egnan og studningspening, nú verða nýtt í garðsdrifini, uttan at endurgjald er latið fyri tað. Hetta var heldur ikki ætlan okkara og er eisini greitt brot á ætlanina hjá studningsveitarunum, tí peningurin skuldi nýtast til antikvariska varðveiting og einki annað.

Føroya Forngripafelag gleðir seg álíkavæl um tað arbeiði, vit gjørdu í Koltri, tí vóru vit ikki so knappir og skjótir á takinum, so lógu mest sum allir teir gomlu virðismiklu bygningarnir slættir í dag, og tað hevði verið stórt spell bæði fyri okkara byggisøgu og eftirtíðina.

Men illa kenna vit okkum viðfarnar.

Vit halda tað vera neyðugt nú at koma við hesar frágreiðingini.

Tórshavn 27. mars 2003
Nevndin fyri Føroya
Forngripafelag
Símun V. Arge
Høgni W. Larsen
Heine Olsen
Mortan Winther Poulsen
Jógvan Ravnsfjall